# Fyrstur við tí seinasta
## 5 ferðir um vikuna




# Ja!

## Sjálvandi vil eg halda Sosialin

irri a i ar s s
a ara a osia i o f i
a i f r ir i a.

a ____________
s a r ____________
os r. ____________
r ____________
irs rif ____________

**Ókeypis**
r r s
os a
osia ri
ri ar
os a i

64

Sosialurin
os s o a
rs a


# Bilar

Nr. 161 • hósdagur • 23. august 2001 • 75. árg.

**Audi**

### Audi A8 W12 Lang

| | |
|---|---|
| Motorurin | 6.0 litur 12 syl. 48V 420 hk |
| 0-100 km/t | 5.8 sek |
| Toppferð | 250 km/t |
| Bensinnýtsla | 7.0 km/l |
| Stødd og Vekt: | |
| Longd | 516,0 cm |
| Breidd | 188,0 cm |
| Hædd | 144,0 cm |
| Eginvekt | 1975 kg |
| Viðførisrúm | 525 litrar |

# W12 og W8 motorar frá Audi og VW


*Gjøgnumskurður av W12 motorinum í Audi A8. Tað sigur nakað um motorin, at hann kann fáa bilin sum vigar næstan 2 tons, frá 0-100 km/t uppá 5,8 sekund.*

**Í 1993 frættist at VW konsernin hevði ætlanir um at luksusbilurin Audi A8 í framtíðini skuldi fáast við W12 motori. Nú er hendan ætlan gingin út, umframt at VW Passat eisini við W8 motori.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ein av fyrimununum við V-motorunum er at teir taka minni pláss í motorrúminum enn teir vanliga rekkjumotorarnir. Tað var tíðliga í tíðini at amerikanarar fóru at brúka V8 motorar, og seinni komu til dømis Ford við Taunus við V4 og V6 motorum. Síðan hava V6 motorarnir verði brúktir í luksusútgávunum av fleiri europeiskum, japanskum og koreanskum bilum.

### W16 motorar ávegis

Heilt einfalt er frágreiðingin um W12 motorarnar, ið verða brúktir í Audi A8, tann at tveir V6 motorar eru settir saman og verða drivnir av sama krumtapsaksuli. W12 motorarnir eru einans tveir millimetrar longri enn V8 motorarnir, sum eru standard í Audi A8. Nýggjasti VW Passat W8 4-Motion hevur ein W8 motor, og VW konsernin arbeiðir nú við einum W16 motori, sum í høvuðsheitum eru tveir samansettir V8 motorar.

*Kelda: FDM / Motor*


*Nú fæst VW Passat við 275 hk W8 motori. Uttan er einasti munurin at hann hevur dupult útstoyt, Xenon forlyktir og dekkstøddin er 225/45-17".*


*Einast munur á bilinum uttan, er hetta skelti í kølaragittaranum*


*Nýggjasti Audi A8 við W12 motori og 420 hestakreftum*